# Visti tú tað?

Umleið 10 føroyskar kvinnur fáa staðfest lívmóðurháls-krabba árliga.

15 kvinnur í Føroyum doyðu av lívmóðurhálskrabba í árunum 1994-2006.

Trý prik og regluligar kanningar kunnu nærum beina fyri lívmóðurhálskrabba.

# Ókeypis koppseting

Gentur, sum eru millum 13 og 15 ára gamlar, verða koppsettar ókeypis. Fyri kvinnur, sum eru eldri enn 15 ár, kostar koppsetingin 3.500 krónur.

Krabbameinsfelagið, Grønlandsvegur 58
Postboks 1216, FO 110 Tórshavn
Tel. 31 79 59, ffk@krabbamein.fo

SENDISTOVAN

# undurlív

krabbameinsfelagið



## 10 føroyskar kvinnur

ella har umleið fáa staðfest lívmóðurhálskrabba árliga. Umleið helmingurin av kvinnunum er yngri enn 45 ár. Heilt ungar kvinnur kunnu eisini fáa sjúkuna.

Lívmóðurhálskrabbi er ein sera álvarsom sjúka. Á hvørjum ári doyggja umleið ein hálv millión kvinnur kring heimin av lívmóðurhálskrabba.

## 15 kvinnur

í Føroyum doyðu av lívmóðurhálskrabba í árunum 1994-2006. Tað vil siga, at á hvørjum ári doyggja kvinnur av eini sjúku, sum tú kanst fyribyrgja. Við teirri nýggju koppsetingini og regluligum kanningum kunnu vit nærum útrudda lívmóðurhálskrabba.

## Hvør er orsøkin til lívmóðurhálskrabba?

Høvuðsorsøkin til lívmóðurhálskrabba er virusið Human Papillomavirus (HPV). HPV er felagsheiti fyri fleiri enn 100 ymisk virussløg,, sum hvør í sínum lagi eru talnevnd. Í minsta lagi 15 HPV-sløg elva til krabbamein. HPV 16 og HPV 18 eru orsøkin til 70 prosent av øllum tilburðum av lívmóðurhálskrabba.

## Hvussu smittar HPV?

Virusið smittar ígjøgnum sex. HPV er ein vanlig smitta hjá monnum og kvinnum. Roknað verður við, at so mong sum 80 prosent av teimum, sum eru seksuelt virkin, hava smittuna. Smittan er serliga vanlig millum ung. Millum 40-45 prosent í aldursbólkinum 15 til 25 ár eru smittað av HPV.

## Hvørji eru sjúkueyðkennini við HPV?

Tú følir ikki virusið, so menn og kvinnur, ið eru smittað, vita tað oftast ikki. Í flestu førum hvørvur virusið av sær sjálvum, eins og krím. Hjá nøkrum kvinnum verður virusið tó verandi, og tær eru í størri vanda fyri at fáa lívmóðurhálskrabba.

### Um smittan ikki verður fyribyrgd og steðgað, so kann tað í ringasta føri ganga soleiðis:

- Tú verður smittað av HPV
- HPV-smittan stendur við í longri tíð
- Tú fært kyknubroytingar í lívmóðurhálsinum
- Kyknubroytingarnar verða til lívmóðurhálskrabbamein

Hendan gongdin tekur vanliga nógv ár, men tað kann eisini ganga skjótt.

## Koppseting

Tú kanst koppseta teg móti krabbameini í lívmóðurhálsinum. Tað er best, um tú letur teg koppseta, áðrenn tú verður sexuelt virkin. Tað vil siga, áðrenn tú kanst verða smittað av HPV. Kvinnur, sum eru sexuelt virknar, kunnu eisini fáa gagn av koppsetingini. Koppsetingin verður viðmælt øllum millum 9 og 26 ár.

Umframt at verja teg móti HPV 16 og HPV 18, verjir koppsetingin eisini móti HPV 6 og HPV 11, sum eru orsøk til 90 prosent av øllum kambfjaðrum á kynsgøgnum.

## Regluligar kanningar

Hóast tú ert koppsett, er umráðandi at møta til regluligu kanningarnar hjá lækkanum, frá tí at tú hevur fylt 25 ár. Saman við koppsetingini kunnu hesar kanningar útrudda lívmóðurhálskrabba.

Endamálið við regluligu kanningunum er at finna og steðga undanstigum til lívmóðurhálskrabba. Kyknubroytingar kunnu vera undanstig til krabbamein, men tær eru ikki krabbamein. Undanstig kunnu viðgerast, so tey ikki elva til krabbamein.

krabbameinsfelagið

**Undurlív er eitt átak, sum Krabbameinsfelagið skipar fyri. Les meira um hetta á www.krabbamein.fo.**